Fáar broytingar

Líkt er til, at einasta broytingin í mun til leygardagin verður, at Øssur Hansen kemur inn aftur á plássið sum vinstri vongverji

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Tað var ikki hin knall harða venjingin, sum Allan Simonsen hevði fyrireikað til leikarar sínar, tá teir mánakvøldið vóru á Tórsvøllu, sum mikudagin leggur gras til seinna landsdystin ímóti russum.

Heldur tóktist tað soleiðis, vøddarnir skuldu hitast væl og virðiliga upp, og á tann hátt mykjast við eitt sindur av løttum bóltspæli. Hetta var nú kanska heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um, undir hvørjum umstøðum leikararnir spældu leygardagin.

Tað var av sonnum ein dystur, sum veruliga seyg megi úr beinunum hjá leikarunum, og tí vildi neyvan verði skilagott at tveitt leikararnar ígjøgnum nakrar kropsligar harðar venjingar beint undan næstu uppgávuni.

Myndin sýnir føroysku uppstillingina, soleiðis sum hon væntandi verður til dystin mikudagin
Grafikkur: Álvur Haraldsen

Eru beinini góð?

Hóast tað sostatt kann hugsast, at fleiri av leikarunum á landsliðnum eru rættiliga moyrir, so tykist Allan Simonsen ongar ætlanir at hava um nakrar stórvegis broytingar á liðnum til mikudagin.

Við seinatsa dupultumfarinum hjá landsliðnum, sum var ímóti Sveis og Jugoslavia, kundi annars verið upplagt, at landsliðsvenjarin valdi at seta nakrar nýggjar leikarar inn. Ta ferðina segði Allan Simonsen eftir stórtapið móti Jugoslavia, at dysturin móti Sveis framvegis sat í beinunum.

Gula liðið

Hóast talan var um lætta venjing, so hugnaðu leikararnir sær at enda við at spæla dyst ímóti hvørjum øðrum, og hesir dystirnir undir venjing geva aloftast eina góða mynd av, hvussu liðið fer at síggja út til komandi uppgávuna.

Býtt varð eins og vanligt í tveir partar, og eins og vanligt, so tóktist gula liðið at vera sett saman av teimum leikarum, sum fara at byrja inni á vøllinum, meðan teir leikarar, sum ongan vest høvdu, helst mugu taka til takkar við einum plássi á beinkinum.

Verður hetta so, er líkt til, at liðið móti Russlandi fer at síggja soleiðis út: Í málinum verður Jákup Mikkelsen. Verjan verður sett saman av Óla Johannesen, Hans Fróða Hansen og Johan Byrial Hansen, og umframt teir tríggjar verður Jens Kristian Hansen helst eitt slag av bylgjubrótara framman fyri miðverjuna. Í borðunum verða Jákup á Borg og Øssur Hansen, meðan Fróði Benjaminsen, Julian Johnsson og John Petersen fara at manna miðvøllin. Í álopinum verður Christian Høgni Jacobsen so einsamallur maður, tó at tað helst er ætlanin, at serliga John Petersen skal stuðla upp undir álopspartin av miðvøllinum.

Ein skal út

Umframt at venjarin skal gera av, hvørjir ellivu skulu byrja á vøllinum, so noyðist Allan Simonsen eisini at boða einum leikara frá, at hesin ikki verður við í hópinum til dystin.

Átjan leikarar kunnu vera í hópinum, men orsakað av leikbanninum hjá Øssi til dystin móti Luksemburg, hevði Allan Simonsen tikið nítjan leikarar út til báðar dystirnar.

Tá eingin leikari tykist útlokaður av skaða, og einki leikbann ger seg galdandi, skal ein leikari sáldast frá, og tað er væl hugsandi, at hesin verður ungi klaksvíkingurin, Hjalgrím Elttør. Hann eigur framvegis fyrstu minuttirnar á landsliðnum til góðar, men hinvegin er hann eisini við í hópinum fyri at læra, og við unga aldrinum havandi í huga, er tað ein leikari, sum framvegis hevur ráð at bíða, til boð verða eftir sær.

Skal sannføra undir venjingini

Eftir at hava sitið leikbann av sær í dystinum móti Luksemburg, er Øssur Hansen aftur í landsliðshópinum til dystin móti Russlandi, men sjálvur er Øssur als ikki vísur í, at hann fer at byrja inni mikukvøldið

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Eftir at hann var leikbannaður, tá Føroyar vunnu regndystin móti Luksemburg, er Øssur Hansen aftur tøkur, tá allan Simonsen skal seta liðið móti Russlandi saman.

- Ikki ein gong Maradona hevði kunna gjørt nakran mun undir slíkum umstøðum, sigur Øssur um umstøðurnar, sum liðfelagarnir stríddust undir leygardagin

Fingu einki gjørt

Eftir venjingina mánakvøldið fingu vit orðið á Øss, og vit spurdu hann sjálvandi fyrst, hvussu tað kendist at vera áskoðari, meðan vanligu liðfelagarnir stríddust í illveðrinum.

- Tað var sjálvandi ein løgin kensla. Eg sat í har á langsíðuni í gulum oljuklæðum og hugdi, men sjálvt um eg gjarna vildi verið við, so er spurningurin, hvønn mun tað hevði gjørt. Veðrið var jú somikið vánaligt, at tað stórt sæð hevði kunnað gjørt tað sama, hvør var á vøllinum, tí fótbólt fekst tú so als ikki spælt. Ikki ein gong Maradona hevði kunna gjørt nakran mun undir slíkum umstøðum.

Bíðar spentur

Hóast hann sostatt ikki tóktist at øvunda liðfeløgunum umstøðurnar leygardagin, so ásannaði Øssur sjálvandi, at tað hevði verið stuttligt at veri partur í sigrinum.

Heldur enn at iðra seg um hetta, valdi hann tó at frøast um úrslitið, sum hann eisini segði setti sín dám á stemningin í hópinum, nú seinna uppgávan stundaði til. Ein av spurningunum til hesa er júst tann, um Øssur – og tað rokna tey flestu helst við - sleppur beina leið inn aftur á liðið, ella um hann í fyrstu atløgu má taka til takkar við einum plássi á beinkinum.

- Nú gjørdu umstøðurnar tað ógjørgrligt hjá leikarunum at spæla fótbólt leygardagin, so avloysararnir á mínum plássi fingu sum so ikki møguleika prógvað tað stóra. Tað er sostatt upp til mín at prógva undir venjingunum, at eg framvegis eigi at vera fyrsta val á plássinum, og sjálvandi vóni eg at sleppa upp í part. Hinvegin er hetta nakað, sum Allan ger av, so vit fáa at síggja.

Men tú spældi jú á gula liðinum undir venjingini í dag. Plagar tað ikki at vera ein góð ábending um, hvør fer at byrja inni?

- Tí væl kenda gula liðnum. Jú tað var eg, men hatta vóru so tíni orð. Sum sagt, so er tað venjarin, sum setir liðið, so eg má bara bíða í spenningi, sigur ein smílandi Øssur.

Kennir treytirnar

Øssur telist annars millum mest royndu leikararnar á landsliðnum. Tríggjar ferðir áður hevur hann verið partur av liðnum, tá Føroyar hava tikist við russar, og tí hevur hann í øllum førum eitt ávíst innlit í, hvussu spælætlanin hjá føroyingunum væntandi fer at verða mikudagin.

Spurdur um hetta sigur Øssur, at ætlanin helst fer at vera á leið tann sama, sum hon vanliga er, tá stórar fótbóltstjóðir standa hinumegin miðlinjuna.

- Skulu vit hava eitt gott úrslit, verður tað fyrst og fremst í verjupartinum, at hetta verður skapt. Ætlanin verðu helst á leið hin sama, sum tá vit spældu í Jugoslav-ia. Tað vil siga, at vit fyrst og fremst mugu ansa okkum í verjupartinum, og so vóna, at tað ber til at skapa nakrar møguleikar í kontraálopunum, sigur Øssur Hansen at enda.

Tilboðið kemur leygardagin

Tá fer Trevor Francis at heita á FCK leiðsluna um at selja tríggjar spælarar – ein teirra sigst vera Todi Jónsson – til Birmingham

ÚTISETAR
Jóannes Hansen

Í gjár segði Todi Jónsson í blaðnum, at hann einki meiri hevur hoyrt um tíðindini um, at hann er á veg til Birmingham, enn tað, sum hevur verið at hoyrt og sað í fjølmiðlunum.

Todi Jónsson, sum fegin ynskir at heilsa kenningunum á landsliðnum, ynskja teimum tillukku við sigrinum á Luksemborg og góða eydnu ímóti Russlandi, hevur framvegis einki hoyrt, og tað er ikki so undarligt. Sambært upplýsingum úr Onglandi, so er einki boð enn farið til Keypmannahavnar, men tað verður eftir øllum at døma seinni í hesi vikuni:

– Tá dysturin í 1. deild ímóti Sheffield Wednesday verður liðugt spældur leygardagin, fer nevndin í Birmingham av hava fund. Tá fer venjarin, Trevor Francis, at leggja fyri nevndina uppskotið um at bjóða upp á tríggjar spælarar hjá FCK. Her er eingin ivi um, at venjarin fer at fáa undirtøku fyri hesum, og so fer Trevor Francis at venda sær til Niels Christian Holmstrøm og bjóða upp á spælararnar.

Hetta segði Colin Calten mánadagin. Hann er tíðindamaður á Birmingham Evening Post, og hann var endurgivin í BT í gjár.

Gamal áhugi

Bæði í Danmark og í Onglandi verður dúgliga gitt um, hvørjir teir tríggir spælararnir eru, sum Birmingham hevur áhuga í. Sum tíðin er liðin, síðani tíðindini fyrstu ferð komu fram, verður tað tikið mest sum fyri givið, at Todi Jónsson er álopsspælarin, sum Birmingham er áhugað í.

Í donsku pressuni verður roknað við, at tað ikki er ein spurningur um lív ella deyð hjá leiðsluni í FCK, um Todi heldur fram í felagnum ella ikki. Donsku fjølmiðlarnir halda, at um prísurin verður tann rætti, so er FCK áhugað at selja føroyska álopsessið.

Birmingham venjarin, Trevor Francis, hevur fleiri ferðir í august verið og fylgt við dystunum hjá FCK. Tær ferðirnar hevur Todi ikki spælt so nógv við, tí hann hevur verið skaddur. Men Trevor Francis hevur leingi havt gott eyga á Toda. Longu tá hann var venjari í Leicester, ætlaði hann at keypa Toda, sum tá spældi í Lyngby. Men tað var av ongum, tí Todi var hevði verið skaddur og helt tískil ikki, at venjingarstøðan var nóg góð, tá Trevor Francis vildi hava hann til Onglands.

Óhappini fylgja Rógva

Seinastu vikurnar hava merktar av upp- og niðurtúrum hjá føroyska elitusúkklaranum, Rógva Johansen

SÚKKLING
Jákup Mørk

Síðani summarfrítíðin var av, hevur føroyski súkklarin, Rógvi Johansen, tikið lut í fleiri kappingum. Ymiskt er, hvussu hevur gingist hjá Rógva í hesum kappingum. Onkun tíð hevur hann ligið væl fyri, men í eitt nú stóru kappingini, Fyn rundt, var Rógvi sera óheppin, tá hann fekk eitt fløskustativ í bremsurnar, og tí mátti gevast.

Upp og niður

Sjúka hevur síðani bremsa Rógva nakað, men seinastu vikurnar hevur lagið tó verið betri aftur. Rógvi var millum annað sera væl við í Post Cup kappingini í Sorø, men helst hevði sjúkraleagan sett síni spor, tí eftir at hava sitið í fremstu rað í 170 kilometrar, noyddist Rógvi sera fyrstan tíð við til at seta ferðina, saman við tveimum súkklarum kom hann eisini í útbrot, tá nakað var útliðið.

Óhappinini síggja tó framhaldandi út til at fylgja Rógva. Í einum svingi bst hann áhaldsn og gleið á regnváta vegnum, og úrslitið varð, at hann noyddist ein túr á sjúkrahúsið.

Tíbetur sýndu kanningarnar, at einki er brotið, men Rógvi sigur sjávlur, at hann hevur meiðsla sær alla vinstru síðu rættiliga illa, og at sum støðan er nú, má hann bara bíða, til hann aftur er førur fyri at fara upp á súkkluna.

Fullur av sjálvsáliti var Rógvi frá fyrstan tíð við til at seta ferðina, saman við tveimum súkklarum kom hann eisini í útbrot, tá nakað var útliðið.

Óhappinini síggja tó framhaldandi út til at fylgja Rógva. Í einum svingi bst hann áhaldsn og gleið á regnváta vegnum, og úrslitið varð, at hann noyddist ein túr á sjúkrahúsið.

Tíbetur sýndu kanningarnar, at einki er brotið, men Rógvi sigur sjávlur, at hann hevur meiðsla sær alla vinstru síðu rættiliga illa, og at sum støðan er nú, má hann bara bíða, til hann aftur er førur fyri at fara upp á súkkluna.

Støðan restaði

Í blaðnum í gjár var sum vant umrøða av dystunum í aðru deild í fótbólti. Tíverri viðførdi plástrot, at rúmd varð ikki fyri stigatalvuni. Niðanfyri prenta vit støðuna eftir 15. umfar

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Skála	15	7 - 6 - 2	27	15	12	27
2	ÍF	15	8 - 2 - 5	47	27	20	26
3	B36	15	8 - 2 - 5	35	33	2	26
4	TB	15	7 - 4 - 4	37	31	6	25
5	HB	15	6 - 3 - 6	30	28	2	21
6	Sumba	15	5 - 4 - 6	33	32	1	19
7	NSÍ	15	6 - 1 - 8	27	36	-9	19
8	LÍF	15	4 - 4 - 7	29	34	-5	16
9	KÍ	15	4 - 4 - 7	24	32	-8	16
10	GÍ	15	3 - 4 - 8	19	40	-21	13

27 pør til bridgekapping

Aktivitetirnir í sambandi við vitjanina hjá danska bridgeskrivaranum og –spælaranum, Svend Novrup, hava verið nógvir, og ymsu tiltøkini hava eisini verið sera væl vitjað. Niðanfyri greiðir Svend sjálvur frá, hvussu gekst, tá opin parakapping varð hildin sunnudagin

BRIDGE
Svend Novrup

Fredag og lørdag deltog 26 i kursuset for viderekomne spillere, og ikke mindre end 27 par dukkede op, da der var indbudt til åben parturnering i Bridgehuset søndag.

De blev inddelt i tre rækker med fælles opgørelse, men kåring af vindere i de tre rækker for sig. Bedst samlet blev Høgni Jacobsen – Eyðun Antoniussen, som vandt den gule række med 324 p foran Per Karlsberg - Danjal Pauli Mohr 317 og Arnbjørn Sivertsen - Hans Jakup Petersen 265 (middel 270).

I den hvide række blev sejren delt mellem Hanus Bærentsen - Simon Hansen og Finn Ougaard - Svend Novrup 303 foran Arni Dam - Carl Mikkelsen 296, mens sejren i den blå række gik til Jogvan Nolsøe - Jakup i Gerðinum 300 foran Dia Jacobsen - Peter Sigurd Rasmussen 287 og Jogvan Ranghamar - Sigmund Dam 282

Mandag og tirsdag afsluttes programmet med to afteners systemdiskussion med rutinerede spillere, der vil have deres systemkort checket og have inspiration til, hvorledes de evt. bliver endnu skarpere.

Flotte spil

Standarden var høj i søndagens turnering, hvilket der var mange eksempler på. Fx blev den overtegnede udsat for regulær mishandling af Hanus Bærentsen - Simon Hansen, der sad Ø-V på dette spil, hvor mange spilførere havde fået lov til at tage 10 stik i 3UT, men der blev ikki givet nogle chancer og jeg måtte ..... fire ned!

Nord. Ø-V

Sp EKB
Hj D64
Ru EB932
Kl DB

Sp 7432
Hj 93
Ru 75
Kl K10875

Sp 986
Hj KB1072
Ru KD10
Kl 32

Sp D105
Hj E85
Ru 864
Kl E964

Vest	Nord	Øst	Syd
	1 Ru	1 Hj	1 UT
pas	3 UT	pas	pas
pas			

Simon Hansen som Vest spillede Hj 9 ud, som Syd var nødt til at stikke i håb om, at ruderne ville arte sig, og Hj D ville være beskyttet, hvis Øst spillede hjerter. I stik to løb Ru 8 til Ru D(!), og Hanus Bærentsen skiftede til klør. Syd stak med esset i håb om, at ruderfarven sad, som Ru K antydede, men da han kneb med Ru 9, kunne Øst stikke med Ru 10. Klør til Vests Kl K, og Vest trak omhyggeligt også Kl 10, før han spillede hjerter gennem Hj D, så Øst kunne tage fire hjerterstik. med fire hjerter-, to ruder- og to klørstik gik kontrakten fire ned. En næsttop til Bærentsen - Hansen. Et enkelt Ø-V-par havde sat en UT-kontrakt tre gange doblet — men det var 6UT!

Finn Ougaard brillerede med et fantasifuldt og vellykket udspil på spil 25, hvor han sad Vest:

Øst. N-S

Sp DB6
Hj B92
Ru E10
Kl EB974

Sp E9832
Hj 75
Ru DB85
Kl K5

Sp K7
Hj 8643
Ru 96432
Kl 32

Sp 1054
Hj EKD10
Ru K7
Kl D1086

Syd åbnede med 1 Kl, Vest meldte 1 Sp ind, og Nord sluttede meldingerne med et spring til 3 Kl.

Mange par havde vundet 3 UT på N-Ss kort, og nogle havde vundet 5 Kl, men Syd kunne være glad for, at han ikke meldte den sidstnævnte kontrakt, for Finn Ougaard gik efter at give sin makker en spartrumfning og spillede derfor Sp 3 ud!! Svend Novrup i Øst kunne vinde med Sp K, spille farven tilbage til Sp E, hvorefter en spartrumfning holdt Syd i 10 stik og 130. En ren top til Ø-V, da alle andre havde 11 stik i UT eller klør.